# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 19. februar 2010


# Flogbóltsoyggin burturav

**At SÍ og Dráttur eiga trý av fýra liðum í steypafinalunum í morgin, er einki at siga til, tí Vágoyggin er blivin mestsum flogbóltsoyggj burturav. Síðstu trý árini hevur annar steypavinnarin verið úr Vágum, men møguleikin er nú størri enn nakrantíð at fáa báðar vinnararnar**





Hilmar Jan Hansen




Hevur tað okkurt við flog at gera, so hevur tað allarhelst eisini okkurt við Vágar at gera. Líka síðani kríggið hevur flogvøllurin óivað verið størsta sereyðkenni fyri oynna, men seinnu árini er kappingin frá flogbóltinum harðnað, tí tú sleppur í dag ikki undan Vágoynni, tá talan er um flogbólt.

Í morgin ber av, tí tá er steypafinalan hjá kvinnum ein rein uppgerð millum tvey vágalið, SÍ og Drátt, umframt at SÍ eisini er umboðað í mansfinaluni, har mótstøðuliðið er Mjølnir, ið eisini er eitt av søguliga sterkastu feløgunum í føroyskum flogbólti.

Síðani síðst í 60-unum tók flogbólturin spakuliga dik á seg í Sandavági og Miðvági, har Dráttur er heimahoyrandi, og 10 ár seinni byrjaðu sørvingar eisini at senda bóltarnar tvørtur um netið. Hvørki SÍ ella Dráttur hava síðani helmað í, og eitt úrslit av tí er vágadominansurin í steypafinalunum hesa ferð.

At flogbólturin stendur so sterkur í Vágum og hevur vunnið so nógv, er merkisvert, tí burtur sæð frá kapproðri, hevur ikki ligið so væl fyri í liðítrótti, eitt nú hondbólti og fótbólti, har tað seinnu árini hevur verið ein sonn fyritøka, bara at vinna sær umboðan í bestu deildunum.

## Bjørt framtíð

Í Sandavági og Miðvági hava tey serliga víst styrki á kvinnusíðuni, har tað er blivið til sjey føroyameistaraheiti og ein steypasigur. Fyrstu árini í feløgunum, MB og SÍF, men síðani fyrst í 80-unum við felagsliðnum, Drátti, sum hevur heimavøll í ítróttarhøllini á Giljanesi.

Heimavøllurin hjá sørvingum er fimleikarhøllin í skúlanum í bygdini, har tað í mong ár vóru mest menninir, ið gjørdu vart við seg. Teir hava síðani 2002 vunnið tríggjar steypafinalur og tvey meistaraheiti, men nú eru kvinnurnar eisini komnar heilt fram í fremstu røð, so tær síðstu tvey árini hava vunnið tvey føroyameistaraheiti og ein steypasigur.

Eingin ivi er um, at tað er eitt miðvíst barna- og ungdómsarbeiði, ið leggur lunnar undir ta serstøðu, Vágar hava í flogbóltinum. Serliga hjá SÍ hevur hetta sæst aftur í góðum úrslitum, tí síðstu gott og væl 10 árini hevur felagið vunnið eitt hav av meistaraheitum hjá unglingum og teimum 16 ára gomlu, bæði hjá gentum og dreingjum, meðan eisini Dráttur tekur sítt barna- og ungdómsarbeiði í størsta álvara.

Í morgin hava Vágar fyri fyrstu ferð garanti fyri, at minst eitt vágalið verður steypavinnari. Um tað so endar við einari serligari vágagreipu, má tíðin vísa…

# Sørvingur ímóti sørvingum

**Vágar eru umboðaðar á øllum fýra finaluliðunum í morgin, tí millum spælararnar á mansliðnum hjá Mjølnir er sørvingurin, Jón Nielsen, sum fimm ferðir fyrr hevur verið við SÍ í steypafinaluni**





Hilmar Jan Hansen


Vit kenna hann frá flogbóltslandsliðnum og besta mansliðnum hjá SÍ, har hann man hava verið við í eini 15 ár. Men tá Mjølnir og SÍ fara á vøllin í morgin at spæla steypafinalu, verður Jón Nielsen ikki við á liðnum, sum hann fimm ferðir fyrr hevur verið í steypafinalu við, men á liðnum hjá Mjølnir.

– At eg nú skal spæla finalu ímóti SÍ, kennist nokk eitt sindur undarligt. Men nú lá ikki fyri hjá mær at spæla við SÍ, og av tí at steypafinalan er ein øgiliga stórur dystur, so mátti at vera Mjølnir, um eg skuldi í finaluna, sigur 29 ára gamli Jón Nielsen.

Hann hevur ikki gjørt so nógv við flogbóltin í vetur, men tá Mjølnirkappingin var herfyri, spældi hann við 1. deildarliðnum hjá Mjølnir. Og nú steypafinalan nærkaðist, lógu teir í Mjølnir framvið at fáa Jón á besta mansliðið hjá sær, og um vikuskiftið spældi hann fyrstu ferð við, tá Mjølnir á Kambsdali vann á ÍF.

– Tað er altíð ringt at koma inn á eitt nýtt lið, so hetta er eitt sindur øðrvísi fyri meg. Eg vóni sjálvandi, at eg sleppi at spæla, men eg vænti ikki, at eg byrji inni. Men fái eg kjansin, so skal eg gera mítt besta til, at Mjølnir vinnur, sigur Jón, ið roynir at brúka sínar drúgvu royndir, um hann sleppur upp í part í finaluni.

– Nú er tað so sum so, hvussu nógv eg havi spælt í vetur, men eg dugi grundspælið, so tað man vera á einari leið. Tað er sum vit at súkkla, at tað nýtist tær ikki at læra fleiri ferðir.



Jón Nielsen hevur í eini 15 ár spælt við besta mansliðnum hjá SÍ, men um hann kemur á vøllin í steypafinaluni hjá monnum í morgin, verður tað sum partur av Mjølnir-liðnum

Mynd: Álvur Haraldsen